# Hálvársfrásøgn 2021

## Interim report H1 2021



TRYGD

TRYGD

# Innihaldsyvirlit / Contents

Gongdin seinastu 5 árini / 5-year financial highlights ... 2
Frágreiðing um fyrra hálvár 2021 ... 3
Eginpeningur og solvensur felagsins ... 4
Útlit fyri seinna hálvár 2021 ... 4
Aðrar upplýsingar ... 5
English Summary H1 2021 ... 6
Rakstrarroknskapur / Income statement ... 7
Fíggjarstøða / Balance sheet ... 8
Uppgerð av broyting í eginogn / Statement of changes in equity ... 10
Notur / Notes ... 11
Nota 1 Nýttur roknskaparháttur ... 11
Grannskoðan ella gjøgnumgongd ... 11
Note 1 Basis of preparation of the H1 financial statements ... 11
Audit and review ... 11
Leiðsluátekning ... 12
Statement by the management ... 12

TRYGD

## Gongdin seinastu 5 árini / 5-year financial highlights

| DKK 1.000 | 30.06.2021 | 30.06.2020 | 30.06.2019 | 30.06.2018 | 30.06.2017 | 31.12.2020 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur/Income Statement** | | | | | | |
| Tryggingargjøld inntøkur, brutto / Gross premiums earned | 69.063 | 65.242 | 60.741 | 56.351 | 50.028 | 132.862 |
| Bruttoskaðaendurgjøld / Gross insurance claims | -47.784 | -50.642 | -36.743 | -37.859 | -33.219 | -89.099 |
| Rakstrarútreiðslur av tryggingarvirksemi / Total insurance operating expenses | -12.701 | -12.753 | -13.043 | -12.515 | -11.978 | -24.477 |
| Úrslit av endurtrygging / Profit/loss on business ceded | -4.241 | -1.170 | -3.348 | -4.074 | 196 | -5.725 |
| Tryggingarteknisk renta f.e.r. / Technical interest, net of reinsurance | -56 | -40 | -97 | -56 | -103 | -114 |
| **Tryggingartekniskt úrslit / Technical result** | **4.282** | **636** | **7.510** | **1.848** | **4.923** | **13.447** |
| Íløguavkast eftir trygg. tekniska rentu / Investment yield after tech. interest rate income | -747 | -483 | -205 | -298 | 133 | -990 |
| **Úrslit / Net profit** | **2.890** | **147** | **5.990** | **1.271** | **4.146** | **10.236** |
| Úrslit av endurgjaldsavsetingum fyri egna rokning / Run-off result from net claims provisions | -1.804 | -2.120 | 1.784 | 1.215 | 2.848 | -1.234 |
| **Fíggjarstøða / Balance sheet** | | | | | | |
| Avsetingar til tryggingaravtalur í alt/ Total technical provisions | 114.682 | 112.668 | 103.379 | 97.360 | 94.048 | 94.696 |
| Tryggingaráogn tilsamans / Total Technical assets | 4.681 | 5.065 | 3.455 | 3.888 | 13.277 | 3.140 |
| Eginogn tilsamans / Total Equity | 60.385 | 91.406 | 82.019 | 74.748 | 72.054 | 101.495 |
| Áogn tilsamans / Total Assets | 185.177 | 213.442 | 194.502 | 181.079 | 174.085 | 206.757 |
| **Lyklatøl / Ratios** | | | | | | |
| Bruttoendurgjaldsprosent / Claim ratio | 69,2 | 77,6 | 60,5 | 67,2 | 66,4 | 67,1 |
| Bruttokostnaðarprosent / Gross expense ratio | 18,4 | 19,5 | 21,5 | 22,2 | 23,9 | 18,4 |
| Nettoendurtryggingarprosent / Net reinsurance ratio | 6,1 | 1,8 | 5,5 | 7,2 | -0,4 | 4,3 |
| Combined Ratio / Combined Ratio | 93,7 | 99,0 | 87,5 | 96,6 | 90,0 | 89,4 |
| Operating Ratio / Operating Ratio | 93,9 | 99,1 | 87,8 | 96,8 | 90,3 | 89,9 |
| Lutfalsligt úrslit av endurgjaldsavsetingum/ Relative Run-off gains/losses | -4,2 | -4,4 | 4,1 | 2,8 | 3,9 | -3,1 |
| Eginognsavkast í prosent / Return on Equity | 3,6 | 0,2 | 7,7 | 1,6 | 5,9 | 10,6 |

5 ára yvirlit er gjørt sambært kunngerð nr. 4 frá 27. juni 2018 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum. Við virknaði frá 1. januar 2019 er nýggja kunngerðin sett í gildi. Samanberingartølini fyri 2018 eru tillagað til nýggju kunngerðina. Tað hevur ikki verið gjørligt at gera tillagingar í samanberingartølunum fyri 2017.

Five Year Summary is rendered in accordance with Executive order No. 4 from 27th of June 2018 on annual reports for insurance companies and financial holding companies. From 1 January 2019 the new Executive order came in to effect. Comparative figures for 2018 are adjusted in accordance with changes in the new Executive order. It has not been possible to adjust main- and key ratios regarding 2017.

TRYGD

## Frágreiðing um fyrra hálvár 2021

Gongdin í fyrra hálvári 2021 var munandi betri enn árið fyri, men tó merkt av fleiri størri skaðum enn væntað. Korona-farsóttin hevur ikki havt stórar fíggjarligar avleiðingar í fyrra hálvári. Tó er váðin við korona-farsóttini framvegis ikki av. Bæði heima og úti í heimi síggjast stórar príshækkingar á tilfari til bygging. Hetta og fleiri størri stormskaðar seinnu árini, hevur havt við sær, at Trygd á sumri 2021 hækkaði prísirnar fyri allar sethúsatryggingar.

Úrslitið áðrenn skatt gjørdist 3,5 mió. kr., sum er verri enn væntað, men munandi betri enn sama tíðarskeið í fjør. Til samanberingar var úrslitið 0,2 mió. kr. áðrenn skatt í fyrra hálvári 2020.

Tryggingartekniska úrslitið gjørdist 4,3 mió. kr. samanborið við 0,6 mió. kr. sama tíðarskeið í 2020.

Síðani Trygd varð stovnað í 1998, hevur kapping verið á føroyska tryggingarmarknaðinum, og Trygd hevur verið ein virkin leikari í menningini av nýggjum tilboðum til føroyskar kundar. Á vári 2021 kom nýggja tryggingin Tanntrygd á marknaðin. Tanntrygd er eitt tilboð til fyritøkur og fakfeløg, ið kunnu tekna tryggingina til ávikavist síni starvsfólk og sínar fakfelagslimir. Donsk hagtøl vísa, at ein dani í miðal brúkar tilsamans 140.000 kr. til tannlæknaviðgerðir yvir lívið. Hóast vit ikki hava líknandi hagtøl í Føroyum, so er nógv, sum bendir á, at talið er áleið tað sama fyri føroyingar.

Covid-19 hevur helst havt størst ávirkan á vinnuliga virksemið, og tað er serliga ferðavinnan, ið hevur merkt eina afturgongd. Gongd væntast tó at koma aftur á ferðavinnuna, samstundis sum fleiri fólk verða koppsett.

Bruttotryggingargjøldini hjá Trygd hava verið støðugt vaksandi seinastu árini. Samanborið við sama tíðarskeið í fjør eru tey hækkaði við 5,6 mió. kr. og eru nú 86,5 mió. kr. í mun til 80,9 mió. kr. fyrra hálvár í 2020.

Útreiðslurnar í sambandi við skaðar vóru lægri enn í fyrra hálvári 2020. Í 2020 var orsøkin til høga støðið serliga, at kundar hjá Trygd fingu endurgjald fyri nógvar stormskaðar og avlýstar uttanlandsferðir orsakað av COVID-19. Skaðaendurgjøld hjá Trygd vóru 45,0 mió. kr. samanborið við 47,1 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør.

Bruttoendurgjaldsprosentið var á einum lutfalsliga høgum støði í fyrra hálvári. Talan var um 69,2% samanborið við 77,6% sama tíðarskeið í fjør.

Íløguvirksemið gav 0,7 mió. kr. í halli samanborið við 0,5 mió. kr. í halli sama tíðarskeið í fjør. Sera lága rentustøðið og varna íløgutilgongdin hjá Trygd gera tað trupult at fáa avkast á marknaðinum. Meginparturin av íløgufænum er sett í lánsbrøv við sera góðari flokking, og restin er vanligt innlán. Ongar íløgur verða gjørdar í partabrøv.

Rakstrarkostnaðurin í fyrra hálvári samsvaraði við væntanirnar og er á nøkulunda sama støði sum sama tíðarskeið í fjør, ið verður mett at vera nøktandi. Tá ið havt verður í huga, at virksemið hjá Trygd er vaksandi, er hetta eitt tekin um, at fyritøkan áhaldandi gerst meira effektiv.

Endurtryggingarskipanin, sum Trygd hevur lagt seg eftir, lagar seg støðugt eftir tilgongdini av kundum og hækkandi virðum umframt at minka um ógvusligu árinini av fleiri stórum skaðahendingum. Vavið av stormskaðum hevur við sær hægri kostnaðir til hendan partin av virkseminum.

Til samans hevur Trygd rentað eginpeningin við 3,6% fyrra hálvár í 2021.

Leiðslan metir úrslitið vera nøktandi, tá hædd verður tikin fyri, at einstakir størri skaðar ávirkaðu lutfalsliga nógv. Leiðslan fegnast um, at felagið er sterkt og er ført at hjálpa kundunum, tá tey hava tørv á hjálp.

## Eginpeningur og solvensur felagsins

Tann 30. juni 2021 var eginognin 60,4 mió. kr. P/F BankNordik eigur partapeningin, ið er 40,0 mió. kr.

Trygd hevur gjøgnum fyrra hálvár 2021 latið inn uppgerðir um individuellan solvens til Tryggingareftirlitið. Uppgerðin um individuellan solvens, ið er neyðugur í sambandi við virksemi felagsins, er nakað lægri enn bókaða eginognin.

Individuella solvenskravið tann 30.06.2021 var 37,5 mió. kr., meðan kapitalgrundarlagið til at lúka solvenskrøvini var 59,7 mió. kr. Hetta vísir, at solvensurin er lutfalsliga góður og á einum støði, ið leiðslan er nøgd við. Felagið hevur ikki goldið vinningsbýti út í nøkur ár, seinast tí váðin fyri COVID-19 var so ókendur, men fyri 2020 varð vinningsbýti útlutað, tá vónirnir fyri eina tryggari framtíð síggjast fyri framman.

Solvensdekningurin pr. 30.06.2021 var 1,60. Niðanfyri sæst solvensdekningurin árini 2017-2021.

| | 30.06.2021 | 30.06.2020 | 30.06.2019 | 30.06.2018 | 30.06.2017 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Solvensdekningur** | 1,60 | 2,11 | 1,54 | 1,59 | 1,64 |

Solvensurin er gjørdur upp eftir sonevndu “Solvens II”-reglunum frá 2018 og fram. Í 2017 er solvensurin gjørdur upp eftir gomlu reglunum, av tí at tað ikki hevur verið gjørligt at gera hann upp eftir nýggju reglunum. Tí kunnu tølini fyri 2017 ikki samanberast við tølini hini fylgjandi árini.

## Útlit fyri seinna hálvár 2021

Leiðslan væntar, at inntøkurnar fara at hækka nakað meira í seinna hálvári, og at skaðarnir fara at vera á einum lægri støði. Tó er korona-farsóttin framvegis ikki av, eins og váðin fyri stormum um veturin altíð er stórur. Eisini er ein váði at arbeiðsskaðar taka drúgva tíð at viðgera, og tí kunnu slíkir gamlir skaðar ávirka úrslitið hjá felagnum.

Úrslitið fyri restina av árinum er í stóran mun tengt at gongdini á tryggingarmarknaðinum, har kappingin um kundarnar framhaldandi er hørð. Harumframt kunnu einstakir stórir skaðar henda – serliga í sambandi við arbeiðsskaðar og stormskaðar – ið ávirka úrslitið hjá felagnum. Stór óvissa er eisini knýtt at COVID-19, ið framhaldandi kann væntast at ávirka gongdina í seinna hálvári.  Tað er trupult at meta um, hvussu leingi og álvarsliga farsóttin fer at ávirka gongdina, men vónirnar eru, at tað ikki fer at ávirka í størri mun.

Leiðslan væntar, at árið endar við einum úrslitið áðrenn skatt ímillum 8 – 13 mió. kr.

## Aðrar upplýsingar

Ongar hendingar eru farnar fram síðan 30. juni 2021, sum hava avgerandi ávirkan á rakstur og fíggjarligu støðu felagsins.

TRYGD

## English Summary H1 2021

A positive development compared to the same period last year but not as good as expected.

Developments in the first half of 2021 for Trygd have been positive compared to the same period last year and are characterised by increasing income but also affected by some large claims. The COVID-19 pandemic still has the potential to negatively affect activity but hopefully that will change due to increasing vaccinations.

Trygd reported a pre-tax profit of DKK 3.5m, which is significantly higher than in the same period last year, but still lower than expected. In terms of comparison, the H1 2020 pre-tax result was DKK 0.2m.

Trygd is an important part of the insurance landscape for Faroese households and companies alike bringing competition to the Faroese insurance market since 1998. As a further sign of the innovation Trygd is bringing to the market the company developed a new insurance during the first half of 2021, a dental insurance called Tanntrygd. This is an insurance that allows for our customers to mitigate the financial effects of dental work over a longer time frame.

From the onset of the COVID19 pandemic there was a significant negative effect and a halt to the positive trends seen in previous periods especially in segments such as tourism and hospitality. Hopefully these segments will return to something like business as usual within a reasonable time.

The management is satisfied with the result taking into account the few large claims during this period.

The fact that the cost level of claims relating to construction of housing especially from material costs created a necessity for Trygd to increase premiums.

The individual solvency requirement was DKK 37.5m on 30 June 2021 while the company's eligible Base Capital was DKK 59.7m. This confirms the company's relatively strong solvency ratio, of which the management is satisfied.

| | 30.06.2021 | 30.06.2020 | 30.06.2019 | 30.06.2018 | 30.06.2017 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Solvency Ratio** | 1,60 | 2,11 | 1,54 | 1,59 | 1,64 |

The Solvency is prepared according to the new Solvency II regulations in 2018-2021. For the year 2017 the Solvency is prepared according to the previous rules and thus not comparable with 2018-2021.

Trygd expects the year to end with a profit before tax between DKK 8 – 13m. There are uncertainties not least the unknown effect going forward from the COVID19 pandemic and the possibility of storms.

No events have occurred since 30 June 2021, which are of material significance to the company's financial or operating position.

TRYGD

## Rakstrarroknskapur / Income statement

| DKK 1.000 | 30.06.2021 | 30.06.2020 |
|---|---|---|
| Tryggingargjøld, brutto / Gross premiums written | 86.464 | 80.886 |
| Endurtryggingargjøld / Ceded insurance premiums | -8.167 | -6.565 |
| Broyting í avsettum tryggingargjøldum / Change in gross provisions for unearned premiums | -17.401 | -15.645 |
| Broyting í endurtryggjaranna parti av avsettum tryggingargjøldum / Change in reinsurers' share of provisions for unearned premiums | 545 | 1.229 |
| **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt / Earned premiums, net of reinsurance** | **61.442** | **59.905** |
| **Renta av tryggingarvirksemi / Technical interest, net of reinsurance** | **-56** | **-40** |
| Útgoldnar veitingar/ Claims paid | -45.199 | -43.245 |
| Endurgoldið frá endurtryggingum / Reinsurance recoveries | 1.780 | 2.368 |
| Broyting í avsetingum til endurgjøld / Change in gross provisions for claims | -2.573 | -8.579 |
| Broyting í váðaíkasti / Change in Risk margin | -13 | 1.183 |
| Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til endurgjøld / Change in reinsurers' share of gross provisions for claims | 995 | 1.197 |
| **Skaðaendurgjøld fyri egna rokning í alt. / Claims incurred, net of reinsurance** | **-45.008** | **-47.076** |
| Útveganarkostnaðir/ Acquisition costs | -9.912 | -9.945 |
| Fyrisitingarkostnaðir / Administrative expenses | -2.789 | -2.808 |
| Provisiónir og partar av úrslitum frá endurtryggjarum / Commission from reinsurers | 605 | 600 |
| **Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi fyri egna rokning í alt / Total insurance operating expenses, net of reinsurance** | **-12.096** | **-12.153** |
| **Tryggingartekniskt úrslit / Technical result** | **4.282** | **636** |
| Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. / Interest income and dividends, etc. | 705 | 810 |
| Virðisjavningar / Value adjustments of investment assets | -1.326 | -1.158 |
| Rentuútreiðslur / Interest expenses | -92 | -82 |
| Fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi / Administration cost related to investment activity | -90 | -93 |
| **Úrslit av íløguvirksemi í alt / Total return on investments** | **-803** | **-523** |
| Renta og virðisjavning av tryggingartekniskum avsetingum / Interest and value adjustments of provisions | 56 | 40 |
| **Úrslit av íløguvirksemi aftaná rentu og virðisjavning av tryggingartekniskum avsetingum/ Return on investment activities** | **-747** | **-483** |
| **Úrslit áðrenn skatt / Profit before tax** | **3.535** | **153** |
| Skattur / Tax | -645 | -6 |
| **Hálvársúrslit / Profit for the period** | **2.890** | **147** |

TRYGD

## Fíggjarstøða / Balance sheet

| DKK 1.000 | 30.06.2021 | 31.12.2020 |
|---|---|---|
| **Ogn /** Assets | | |
| Rakstrargøgn / Operating equipment | 842 | 584 |
| Bygningar til egna nýtslu/ Real property | 2.631 | 2.645 |
| **Materiell ogn í alt / Total tangible assets** | **3.473** | **3.229** |
| Lánsbrøv / Bonds | 160.189 | 179.405 |
| **Íløguogn í alt/ Investment assets** | **160.189** | **179.405** |
| Endurtryggjaranna partur av avsettum tryggingargjøldum/ Reinsurers' share of provisions for unearned premiums. | 1.132 | 587 |
| Endurtryggjaranna partur av avsetingum til endurgjøld / Reinsurers' share of provisions for unpaid claims. | 3.549 | 2.554 |
| **Endurtryggjaranna partur av avsetingum til tryggingaravtalur í alt / Total reinsurer's share of provisions for insurance contracts** | **4.681** | **3.140** |
| Áogn hjá tryggingartakarum / Receivables from policyholders | 5.551 | 3.388 |
| **Áogn í samband við beinleiðis tryggingaravtalur í alt / Total receivables in connection with direct insurance contracts** | **5.551** | **3.388** |
| Áogn hjá tryggingarfeløgum / Receivables from insurance companies | 305 | 1.778 |
| Áogn hjá atknýttum virkjum / Receivables from affiliated companies | 0 | 514 |
| Onnur áogn / Other receivables | 0 | 0 |
| **Áogn í alt / Total receivables** | **10.537** | **8.820** |
| Útsett skattaogn / Deffered tax surplus | 98 | 114 |
| Tøkur peningur / Cash and cash equivalents | 9.211 | 13.012 |
| **Onnur ogn í alt/ Other assets** | **9.309** | **13.126** |
| Rentur tilgóðar og innvunnin leiga / Outstanding interest and rent | 664 | 1.098 |
| Aðrar tíðarmarkinger / Other prepayments and accrued income | 1.006 | 1.080 |
| **Tíðaravmarkingar í alt/ Total accrued income** | **1.670** | **2.178** |
| **Ogn í alt / Total assets** | **185.177** | **206.757** |

TRYGD

| Nota | DKK 1.000 | 30.06.2021 | 31.12.2020 |
|---|---|---|---|
| | **Skyldur / Equity and liabilities** | | |
| | Partapeningur ella ábyrgdarpeningur / Share capital | 40.000 | 40.000 |
| | Aðrar burturleggingar / Reserve Equity fund | 615 | 615 |
| | Framflutt úrslit / Retained earnings | 19.770 | 16.880 |
| | Uppskot til vinningsbýti / Proposed dividends | 0 | 44.000 |
| | **Eginogn í alt / Equity** | **60.385** | **101.495** |
| | Avsett til tryggingargjøld / Gross provisions for unearned premiums | 61.770 | 44.369 |
| | Avsett til endurgjøld / Gross provisions for claims | 48.473 | 45.900 |
| | Váðaískoyti á skaðatryggingaravtalum / Risk margin | 4.440 | 4.427 |
| | **Avsetingar til tryggingaravtalur í alt / Total technical provisions** | **114.682** | **94.696** |
| | Útsettur skattur / Deferred tax receivables | | 0 |
| | **Avsetingar í alt / Total provisions** | **114.682** | **94.696** |
| | **Skuld / Debt** | | |
| | Skuld í sambandi við beinleiðis trygging / Debt related to reinsurance | 1.029 | 1.362 |
| | Skuld í sambandi við endurtrygging / Debt related to reinsurance | 876 | 199 |
| | Skuld til atknýtt virkir / Commitments to related parties | 1.560 | 1.757 |
| | Beinleiðis skattur / Tax | 2.966 | 2.336 |
| | Onnur skuld / Other payables | 3.276 | 3.609 |
| | **Skuld í alt/ Total debt** | **9.707** | **9.263** |
| | **Tíðaravmarkingar / Accruals and deferred income** | **403** | **1.303** |
| | **Skyldur í alt / Total equity and liabilities** | **185.177** | **206.757** |

1 Nýttur roknskaparháttur / Accounting Policies

TRYGD

## Uppgerð av broyting í eginogn / Statement of changes in equity

| Eginognsuppgerð / Statement of changes in equity | Partapeningur / Share capital | Uppskrivingargrunnur / Revaluation | Flutt úrslit / Retained earnings | Uppskot til vinningsbýti / Proposed dividends | Eginogn / Equity |
|---|---|---|---|---|---|
| **Eginogn 1. januar 2019 /** Shareholders'equity at January 1, 2019 | 40.000 | 615 | 50.644 | 0 | 91.259 |
| **Ársúrslit /** Net profit | 0 | 0 | -33.764 | 44.000 | 10.236 |
| **Eginogn 31, desember 2020 / Shareholders'equity at December 31, 2020** | **40.000** | **615** | **16.880** | **44.000** | **101.495** |
| **Eginogn 1. januar 2021 /** Shareholders'equity at January 1, 2021 | 40.000 | 615 | 16.880 | 44.000 | 101.495 |
| **Útgoldið vinningsbýtið /** Payed dividend | 0 | 0 | 0 | -44.000 | -44.000 |
| **Ársúrslit /** Net profit | 0 | 0 | 2.890 | 0 | 2.890 |
| **Eginogn 31, desember 2020 / Shareholders'equity at December 31, 2020** | **40.000** | **615** | **19.770** | **0** | **60.385** |

TRYGD

# Notur / Notes

## Nota 1 Nýttur roknskaparháttur

Roknskapurin er gjørdur sambært kunngerð nr. 4 frá 27. juni 2018 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum. Nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til ársroknskapin fyri 2020. Víst verður tí eisini til brotið um nýttan roknskaparhátt í ársroknskapi felagsins fyri 2020.

## Grannskoðan ella gjøgnumgongd

Hálvársfrásøgnin er ikki grannskoðað ella gjøgnumgingin.

## Note 1 Basis of preparation of the H1 financial statements

The interim financial statements have been prepared in accordance with Executive Order No. 4 from 27th of June 2018 on financial reports presented by insurance companies and holding companies. The accounting policies are unchanged in respect to the Annual Report for 2020. For reference see also the section with Accounting Policies in the 2020 Annual Report.

## Audit and review

No audit or review has been done to this interim report by the internal or external auditors.

TRYGD

## Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðkent hálvársfrásøgnina fyri fyrra hálvár 2021 hjá Trygd P/F.

Hálvársfrásøgnin er gjørd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Vit meta, at hálvársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum, fíggjarstøðuni tann 30. juni 2021 og úrslitinum av virksemi felagsins fyri tíðarskeiðið 1. januar til 30. juni 2021.

Okkara fatan er, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um gongdina í Trygd P/F, fíggjarligu støðuna umframt eina lýsing av týdningarmestu óvissunum, sum kunnu fara at ávirka felagið.

Tórshavn, 23. august 2021

## Statement by the management

The Board of Directors and the Management Board have today considered and approved the interim report of P/F Trygd for the six months ended 30 June 2021.

The interim financial statements have been prepared in accordance the regulatory requirements and possible requirements from Trygd's Articles of Association or contracts.

In our opinion, the management's report includes a true and fair view of the company's assets and liabilities, and the balance sheet at 30 June 2021 and of the result of the company's operations for the period 01 January 2021 to 30 June 2021.

We consider the management's report to give a fair representation of the development of Trygd P/F and describes significant risks and elements of uncertainty that it faces.

Tórshavn, 23 August 2021

**Stjórn / Executive Board**

Brian Smedemark

**Nevnd / Board of Directors**

Árni Ellefsen
*Formaður / Chairman*

Turið F. Arge

Rune Nørregaard

Christian Clemmensen